petur & petur • 320870

Stuðul frá FITUR

ÍSLAND • FØROYAR



FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarvi millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.

Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnuur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttafeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Mentunarfeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald

Umsóknir skulu stílast á donskum ella enskum og sendast til:

FITUR
c/o Ferðaráð Føroya
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

ella

FITUR
c/o Ferðamálsráð Íslands
Lækjsrgata 3
IS-101 Reykjavík, Ísland

Seinasta freist at søkja er 15. november 2000.

Í nevndini sita Petur Olivar í Hoyvík, nevndarformaður í Ferðaráð Føroya, Marita Danielsen, Flogfelag Føroya, Magni Arge, Atlantic Airways, Arnbjørg Sveinsdóttir, Steinn Lárusson, Icelandair og Gunnar Sigurdsson.

Hvalbiar Skúli

Søkt ver›ur eftir vikari fyri lærara í barnsbur›arfarloyvi frá uml. 1. desember og 24 vikur fram. Tímatali› er 27 tímar um vikuna.

Lærugreinir: Tekstvi›ger› 8.-9. fl., landalæra 6.-7.-8.-9. fl., føroyskt 1.-3. fl., serundirvísing, bókasavn og flokslærari hjá 1. fl.

Starvi› er tí›aravmarka› og ver›ur lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálast‡ri›.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 6. november 2000.

Hvalbiar Skúlanevnd
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba

Dagstovnurin í Gøtu

søkir starvsfólk:

Eina dagrøktarmammu at byrja skjótast tilber. Arbei›stí› og løn sambært sáttmála hjá Starvsmannafelagnum um dagrøkt.

Sjúkraavloysara at byrja skjótast tilber.
Løn sambært sáttmála hjá Gøtu Arbei›arafelag.

Tvey vaskifólk at byrja skjótast tilber.
Arbei›stí› 15 tímar um vikuna hvør.
Løn sambært sáttmála hjá Gøtu Arbei›arafelag.

Nærri uppl‡sing um størvini fæst vi› at venda sær til lei›aran, tlf. 442012, lokal 10.

Umsóknirnar skulu vera skrivligar og innkomnar 9. nov. 2000 og sendast til:

Dagstovnin í Gøtu
FO-511 Gøtugjógv

LANGUR LEYGARDAGUR
Opið er til kl. 17.00
Kom inn og síggj okkara stóra úrval

FLJÓÐIÐ
Sigmundargøta 4 • 100 Tórshavn • Tel. 31 17 18

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Sosialurin - 311820

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING
v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

L‡singar til Sosialin?
e-mail:
lysing@sosialurin.fo

Vikuskifti

Nr. 208 • leygardagur • 28. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Ansni og skapan

Ísta›in fyri at definera naka› ávíst sum mentan kunnu vit heldur minna hvønn annan á tann subjektiva partin vi› ansni og skapan, sum bert vit sjálv hava ábyrgd av, heldur Rói Patursson, forma›ur í n‡ggja Mentanargrunni landsins

sí›a 22-23

Tróndur í Stórustovu, 11 ár, hevur sæ› Pippi í Sjónleikarhúsinum

Mynd: Jens Kristian Vang

Pippi er grúviliga gó›!

UMMÆLI: Leygarkvøldi› 21. oktober sá eg Pippi sjónleikin í Sjónleikarhúsinum í Havn. Eg var vi› langommu og Barbaru, sum er tri›i-annar hjá mær. Hon er 11 ár, eins og eg sjálvur.

Eg fekk pengar frá langommu at keypa sunkist og ein pakka av bommum í gongini, á›renn vit fóru inn. Frammanundan høvdu vit bestilt pláss til langommu. Har var eingin, sum eg kendi, men ta› var flott at koma inn. Ein flottur pallur og fult av fólki. Tey sum tóku ímóti billettum, spældu eisini vi›. Í hvussu er vóru tey í somu klæ›um, sum tey á pallinum. Ta› var stuttligt.

Leikurin byrja›i vi› at Pippi kom dansandi inn, berandi hestin og snakka›i vi› Harra Nilsson — ta› er apan. Hesturin var ein toyhestur, sum var í tveimum; fyrst ein sum eingin var í og so ein vi› tveimum fólkum í. Sí›ani komu Tommy og Annika á pallin, og nú vóru tey í gar›inum hjá Pippi.

Stuttligast var scenan tá i› Pippi var inni hjá Tommy og Anniku og gjørdi nógv stuttlig ting. Hon var allatí›ina stuttlig og eisini allar stuttligast. Hon hev›i jú eisini høvu›sleiklutin. Men politistarnir vóru eisini stuttligir. Pippi lokka›i teir upp á altanuna í einum stiga, og so tók hon stigan frá teimum, ta› var stuttligt.

Men ta› larma›i nokk so nógv; Pippi hev›i mikrofon uppi á oyranum, so onkutí› rópti hon hart og onkuntí› larma›i ta› illa. Millum anna› tá hon klemma›i pápan. Tá kom mikrofonin ímóti. Pápa Pippi sá man ikki fyrr enn í endanum. Hann var sjórænari og kom aftur av skipinum. Mammu Pippi sá man onganti›. Hon var ein eingil, søgdu tey í leikinum.

Ta› vóru tríggir gó›ir og stuttligir sangir í leikinum. Ein í byrjanini, ein í skúlanum og so ein í endanum. Pippi sang sjálv sangirnar, og ta› dugdi hon væl. Tann fyrsta kendi eg úr Pippi-filmunum.

Máli› var lætt at skilja. Men Pippi b‡tti oftani um uppá or›ini og seg›i tey øvugt. Ta› var heilt stuttligt. Pippi var í klæ›unum, sum hon alti› er í í bókunum, eisini hini. Onkrir sjórænarar vóru í føroyskum buksum og slitnum hosum. Ta› rigga›i væl.

Á pallinum vóru vit í húsinum hjá Pippi, og har vóru trø og kanónir. Ta› var ein blanding av húsunum hjá Pippi og so einum sjórænaraskipi vi› kanónum. Og so eisini einum fínum húsum, har tey drukku the. Einafer›ina skiftu húsini hjá Pippi til ein skúla. Pippi dansa›i, tá hon var í skúla. Fyrst bleiv lærarinnan ó›, so dansa›i hon vi› Pippi, men so bleiv hon ó› aftur.

Eina gentu kendi eg, sum spældi vi›. Eg havi gingi› til drama saman vi› henni. Ta› var í einum dramaverksta›i hjá Hjørdis, beint vi› svimjihylin. Eg havi onga Pippi-bók lisi›, men havi sæ› nógvar filmar. Bøkurnar eru meiri fyri gentur, haldi eg. Men Pippi er sterk og stuttlig, ta› dámar mær best vi› henni.

Ta› er spennandi at ganga til sjónleik, men leikirnir skulu helst ver›a stuttligir. Men eisini handla um okkurt. Ikki bara vera stuttligir. Leikhúsjól havi eg spælt vi› í, tá var eg ein lítil nissa, so tann leikin sá eg fleiri fer›ir. Eisini havi eg sæ› hann á video, sum eg fekk frá Sjónleikarhúsinum. Tá ta› eru videofilmar, dámar mær eisini best, at teir eru stuttligir.

Karakterur fyri leikin um Pippi: millum grúviliga gó›ur og gó›ur.

Tróndur